# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:







Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo

Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo

Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo

Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo

Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo



*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

## Ellingsgaard roynir seg í Vanløse

Johan Ellingsgaard flutti til Danmarkar í lestrarørindum síðsta summar. Hann var við frá byrjan hjá Vanløse, sum spældi venjingardyst móti Ringsted leygardagin. Johan Ellingsgaard spældi vongverji í høgru í fyrra hálvleiki. Michael Madsen, venjari, skifti alt liðið út í steðginum. Tað er framvegis ikki greitt, um Johan Ellingsgaard verður knýttur at hópinum. Ringsted vann 2-1.



*Daniel Udsen í steypafinaluni móti ÍF á Summarfestivalinum í fjør*

*Savnsmynd: Álvur Haraldsen*

# Udsen valdi EB/Streym

**FÓTBÓLTUR** Daniel Udsen hevur verið í samráðingum við Vanløse seinastu vikurnar, men føroyski landsliðsleikarin hevur tikið støðu. Hann heldur fram í EB/Streymi

Uni Holm Johannesen

Tað skrivar bold.dk.

Udsen og EB/Streymur hava skrivað undir sáttmála, sum knýtir hann at felagnum í 2011. Tað verður væntandi hansara seinasta kappingarár í Føroyum, sigur hann við donsku heimasíðuna.

- Vit skuldu finna eina fíggjarliga loysn. Eydnaðist tað ikki, hevði eg skift til Vanløse, og Michael Madsen, venjari, skilir mína støðu. Eg treivst væl í Føroyum, og eg havi lært nógv. Eg stevni aftur til Danmarkar eftir kappingarenda í ár, og so fáa vit at síggja, hvat eg ætli, sigur Daniel Udsen, sum leggur dent á, at EB/Streymur skal finna føroyameistaraheitið í ár.

Daniel Udsen skifti til EB/Streym undan kappingarbyrjan í fjør. Hann hevur spælt fimm altjóða skrásettar landsdystir fyri Føroyar.

Udsen hevur áður umboðað FC Vestsjælland, FC Amager, Fremad Amager, Greve og Albertslund.



*Jan Pytlick (vinstrumegin) og Ulrik Wilbek, koma til Føroya á vitjan*

# Pytlick og Wilbek til Føroya

**HONDBÓLTUR** Donsku landsliðsvenjararnir, Jan Pytlick og Ulrik Wilbek, vitja í Føroyum í hesum árini. HSF og danska hondbóltssambandið hava samstarvsavtalu

Uni Holm Johannesen

Jan Pytlick, danskur kvinnulandsliðsvenjari, og Ulrik Wilbek, danskur manslandsliðsvenjari, vitja í Føroyum í hesum árini.

Endamálið við vitjanini er at geva føroyskum hondbólti íblástur. Tað sigur Kristian Johansen, sum er formaður í HSF.

– Ætlanin er, at teir skulu kunna føroyskar venjarar og geva teimum íblástur at hugsa nýtt og øðrvísi, sigur hann.

Kristian Johansen hugdi at HM-finaluni í gjár, og hann hevði ikki neyðugu upplýsingarnar um vitjanina, tá Sosialurin ringdi til hansara í morgun, stutt fyri evstamark. Hann veit ikki at siga, hvat vitjanin fer at kosta HSF, men nevndin skal ikki langt niður í lumman, tí danska hondbóltssambandið plagar at veita HSF holla hjálp.

– Vitjanin er partur av samstarvsavtaluni, sigur Kristian Johansen.

*uni@sosialurin.fo*

## Miðlarnir skriva:

Áh nei – vit fingu bara javnleik

*www.kyndil.fo*

Neistamenn eru framvegis ósigraðir í FM-kappingini. Teir taka alt róliga og hugna sær á vøllinum við skjótum og undirhaldandi álopsspæli. Verjuspælið goyma teir í skjáttuni og finna tað fram, tá ið brúk er fyri verjuspælinum. Eftir at Kyndil spældi javnleik í Kollafirði, eru neistamenn í FM-finaluni.

*www.neistin.fo*

Heimindarfólk okkara sigur stutt um dystin at yvirhøvur var hetta ein dystur, sum ikki eigur at sita leingi í minninum.

*www.h71.fo*

Við Milan Cimburovic, sum høvuðsvenjara, tryggja TB og Royn, at ungdómur teirra fær bestu venjingarnar, ungdómur kann fáa, og hervið verða karmarnar eisini av teimum bestu.

*www.tb.fo*

Norskar kanningar hava staðfest, at yvir 50 prosent av børnum í 5. skúlaflokki ikki duga at svimja 200 metrar. Norska verjan hevur eisini staðfest at færri og færri ungdómar duga at svimja, og tí krevja úrvalssvimjarar sum Alexander Dale Oen og Gard Kvale nú, at politikarar annaðhvørt seta í verk átøk til at læra norðmenn at svimja, ella taka tað uppá seg at fólk drukna

*www.svimjing.com*